**HORNASOFA**
Svørt leður hornasofa til sølu vegna plásstrot 1.800,-
*Tlf. 225851*

**YNSKIST**
Øðrvísi og spennandi (gamalt?) hondvask til baðiverilsi ynskist. Keramikk, stál ella glas.
Vanlig hvít WC kumma ynskist (ikki veggmodell).
Krani til køksvask ynskist, helst høgur so grýtur/spannir sleppa undir.
Blandingsbattarí til brúsu ynskist.
Dustsúgvari ynskist.
*Tlf. 584342*

**RUGGUSTÓLUR**
Trivaligur ruggustólur til sølu fyri 100 kr.
*tlf. 441893*

**STÓLAR TIL SØLU**
36 stólar til sølu, bláir v/ stálbeinum, lættir at stápla. Prísur 7.200 kr. ella 200 kr. stk.
*Tlf. 375459*

**KØKSBORÐ TIL SØLU**
Eitt gamalt myrkt køksborð við 4 gomlum stólum til sølu. Boð undir kr. 5000,- ongan áhuga.
*Ring 243356 eftir kl. 16.00*

**EIN SERA VAKUR SKENKUR**
úr palisander v/ yvirskápi og glashurðum, 2 m. langur, bíliga til sølu.
*Tlf. 372001/255552*

**UNGDÓMSSOVISOFA**
til sølu fyri 300 kr. (80 x 200) lítið brúkt.
*Tlf. 311327*

**HYGG HER!**
Ein sera vælhildin sofa, sum kann sláast út, til sølu.
*Tlf. 257983*

**VEGNA FLYTING SELIST Í HAVN**
klassisk, ljós 3-mans sofa, góður kvalitetur, 2.400,- kr. nýprísur 8.000,- kr.
Reolsystem 170x75, brunt beisað 100,- kr.
Telduborð 80x40, 160,- kr.
*Ring fyri at hoyra nærri á 509005*

**TIL SØLU**
Sovibrúk v/ skuffu + stólur og borð til tannáring, sær út sum nýtt, kr. 1.000,-
Hornasofa, myrkabrún floyal kr. 500,-
*Tlf. 321640/521640*

**BARNAMØBLAR TIL SØLU**
2 sett av sera fittum møblum til barnakamar bíliga til sølu.
*Tlf. 441791/281791*

**TIL SØLU**
Dupultsong 180x 200 cm fura.
Hornasofa 240cm gráReolsystem 200 cm hvítt.
*Tlf. 273609*

**YMIST TIL SØLU**
Spísiborð 2 m x 92 cm. og tveir leður lenistólar til sølu.
*Tlf. 312322*

**HEY HEY!**
Vit bjóða okkara høgt elskaðu 2+3 sofur til sølu. Tær eru sera væl viðfarnar úr ljósum leðri. Nýprísur 15.000,- kr. Tær verða seldar fyri 5.000,-. Sparið 10.000,- kr.
*Tlf. 310584/510584*

**BRÚKT LEÐUR HORNASOFA**
ynskist til keyps fyri sámuligan prís, helst ljós ella ljóstbrún á liti. Um tú hevur eina at selja, so vinarliga ring
*tlf. 443598 ella 267588*

**YNSKIST**
Hvít WC kumma ynskist.
Blandings battarí til brúsu ynskist umframt krana til køksvask og hondvask.
Dustsúgvari ynskist.
Sengur (box madrass) 120 cm breiðar og einkult sengur ynskjast.
Mugu vera í góðum standi.
*Tlf. 584342*

## Leikur

**FJARSTÝRDUR SPEEDBÁTUR**
Eg selji ein fjarstýrdan speedbát við nitromotori (bensin) uttan fjarstýring, søluprísur er 2.000 kr.
*Tlf. 321969 eftir kl. 18*

**UNDIRVATNSBÁTUR**
Ein fjarstýrdur undirvatnsbátur til sølu. Báturin er uml. 1 m. langur. Báturin er nýbygdur og kann dykka. 4.000 kr.
*Tlf. 321969 eftir kl. 18*

**HPI MONSTERTRUCK**
Við Nitromotori 3.5 ccm 2.1 HK. Bilurin er super og hevur 2 gear + bakgear. Søluprísur 3.500 kr.
*tlf. 214163*

## Lutaseðlar

**TVØROYRAR SVIMJIFELAG**
Ikki avheintaðir vinningar av lutaseðlum hjá Tvøroyrar Svimjifelag drignir 15 des. 04.
Vinningur nr. 1 lutaseðil nr. 974, vinningur nr. 3 lutaseðil nr 1332, vinningur nr 4 lutaseðil nr 2445, vinningur nr 7 lutaseðil nr 1993, vinningur nr. 11 lutaseðil nr. 2026. Sigið frá í seinasta lagi 31 januar á tlf. nr. 221141 eftir hetta, falla vinningar aftur til felagið.
*Tvøroyrar Svimjifelag*

## Matur

**KROV TIL SØLU**
Neytafjóðringar kunnu bíleggjast.
*Tlf. 218101 - Velbastað*

**TIL SØLU**
Eitt veðrakrov til sølu.
*Tlf. 456154/251402*

## Pløgg

**KONFIRMATIÓNSKLÆÐIR**
Lilly - stuttur. Toppur, niðurdeilur, undirskjúrt og turriklæði, stødd 38.
*Tlf. 741744 ella 441744*

**FRIENDTEX**
Rimmar útsøla av Friendtex klæðum verður í Støðlagøtu 14, kj., Argir fríggjadagin 28. januar frá kl. 13-20 og leygardagin 29. januar frá kl. 13-18. Alt fer fyri hálvan prís. Nógvar stórar støddir. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Anja*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
Konfirmatiónskjóli við jakka bíliga til sølu. (langur,einkultur,str.36, lilly model).
*Tlf. 212803*

**VESTUR TIL DRONG YNSKIST!**
Vestur til drong 7-8 ár ynskist til føroyska búnan, helst reyður.
*Tlf. 224946 eftir kl. 15*

**BRÚDLEYPSKLÆÐIR TIL DRONG**
str. 134-140, svartur velafrakki, svartar buksur, gráur silkivestur við mynstri og cravat. Einans 500 kr.
*Tlf. 322213 eftir kl. 17*

**BRÚÐARGENTUKJÓLI TIL SØLU**
kjóli, std. 4 ár, úr rásilki við gullbroderí. Tilhoyr: Gullskógvar, taska, hárprýði, einans 500 kr.
*tlf. 322213 eftir kl. 17*

## Samband

**EINLIG MAMMA**
søkir samband við trúgvandi mann. Aldur 30-40 ár, børn eingin hindring. Send eina mynd við. 100% tagnarskylda.
Skriva til
Sosialin
box 76
110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 2011*

**SAMBAND YNSKIST**
við kvinnu 50-60 ár. Eg eri fyrst í 60-árunum, vóni at frætta skjótt. 100% tagnarskylda.
Skriva til
Sosialin
box 76
110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 2007/3*

## Sjavs

**FRÁ TÓRSHØLL**
Sjavskapping verður týsdagin 1. febr. kl. 19. Øll eru vælkomin.
*Tórshøll*

**SJAVSKAPPING**
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.45.
*LÍF*

**HALDÓRSVÍKAR AVHALDSFELAG**
Sjavskapping verður sunnudagin tann 30. januar kl. 16.00.
*Nevndin*

**SJAVS**
Sjavskapping verður sunnudagin kl. 16.00.
*NSÍ*

**SJAVS**
verður í Felagslonini í Fuglafirði, fríggjakvøldið 28. januar kl. 19.00.
*Eldrafelagið Borgin*

**SJAVS**
verður í felagshúsinum Torvgøta 2, mikukvøldið kl. 18.45.
*Eldrafelagið Nón, Saltangará*

## Súkklur

**BARNAHJÓLHESTAR**
Tríggjar tvey-hjólaðar barnasúkklur (100 kr/stk) og ein DBS-cross súkkla (200 kr.) til sølu.
*tlf. 441893*

**DAMUSÚKKLA TIL SØLU**
Ein 2 ára gomul damusúkkla til sølu, sær út sum nýggj og hevur 7 gear.
*Ring 243356 efti´r kl.16.00*

**HONDA X8RS TIL SØLU**
í góðum mekaniskum standi. Er frá mars 2003. Koyrt 7800 km. Kavaketur fylgja við. Kr. 14.000
*Tlf. 224069*

**TIL SØLU**
PGO Komet, er spildurnýggj við einari bagagubox, hevur bara koyrt 130 km, er 3 mðr. gomul, 14.000 kr.
*Tlf. 252829*

**YAMAHA 1100 VIRAGO**
Súkklan er frá 1996 men hevur einans koyrt 1300 km og er sum spildurnýggj í allar mátar. Kann keypast fyri 50.000 kr. uttan avgjald. (Avgjald uml. 25.000 kr.)
*Tlf. 212112*

**FARTELDA TIL SØLU**
HP 17" Widescreen, 3.2 GHZ P4, 512 MB Ram (S12 eyka fylgjandi) amerikanskt Windows XP, DVD-brennara, tráleysmús, taska o.a. Spildurnýggj, kr. 15.000,-
*Tlf. 283568*

**PRUTL YNSKIST**
Prutl sum koyrur ynskist til keyps. Motorurin skal verða í hampuligun standi og skal koyra gott. Tað er líkamikið um tað er tuna ella ikki.
*Tlf. 255178*

**APRILIA RX**
1 1/2 ára gomul Aprilia RX í góðum standi til sølu fyri hægsta boð yvir 15.000,-kr.
*Tlf. 748392*

**KNALLERT TIL SØLU**
Ein Derbi senda R, 49 ccm til sølu fyri 16.500 kr. Hevur næstan einki koyrt. Skriva til 220555 og eg skal ringja skjótast gjørligt.
*Skriva til 220555*

**EYKADEILIR**
til Yamaha FS1 til sølu.
*Tlf. 264797*

## Teldur

**TIL SØLU**
19" SAMTRON skermur til sølu kr 1500,-
*Tlf. 271982*

**TIL SØLU**
ISDN Moden 350 kr. Telduspøl: FIFA 2001 150 kr. FIFA 2002 150 kr. Total Club Manager 2003 150 kr.
*Tlf. 222610*

**TELDA TIL SØLU**
2500+ MHz AMD preocessari, 512 MB DDR Ram, 160 GB harddiskur, Radeon 9000 family skermkort, CD-R-RW brennari, 17" skermur, LAN 100 Mbit, tráleyst Internet kort, flott lýsandi kabinett. Selist samlað fyri 8.000 kr.
*Tlf. 250297/319604, Hjalti*

**TIL SØLU**
PC-spæl Tetris útgáva, fyri DOS. eitur Wordtris, við kvittan. Nýprísur 100 kr. (frá 1994) Hvat vilt tú geva.
*Tlf. +45 86448627/+45 26747474*

**HEVUR NAKAR**
eitt Saga spæl at selja mær?
*Tlf. 210560*

**X-BOX**
frá 2004 við 2 joystikkum og 4 spølum til sølu fyir 1700,-
*Tlf. 318415/218415*

**TOSHIBA SATELLILTE A10**
Pentium 4, 2,4Ghz. Windows XP Home, 30Gb hardisk, 512Mb ddr-ram, 2USB, PCMCIA Slot, 64Mb internt grafikkort, DVD-rom drev, 14" skerm, SounMax Digital Audio Ljóðkort. Tilhoyr: Taska, mús og tráðleyst netkort(PCMCIA). Teldan er sum nýggj, bert 8 mánaðar gomul. 6900 kr.
*Ring á tlf: 321775/508575*

**HJÁLP TIL TELDUNA**
Vit hjálpa tær við smáum sum stórum, fyri fastan prís, 150 kr. Hoyr nærri á tlf. 318053 millum kl. 17 og 19 allar dagar.
*Tlf. 318053, kl. 17-19*

## Tónleikur

**MEGAKRAFTIGUR BASSHÁTALARI**
Til bilanlegg til sølu fyri kvartan prís. Hann er nóg illa tilkoyrdur. Merki er JBL
*Tlf. 503074*

**STEREOANLEGG**
Við plátuspælara bíliga til sølu.
*Tlf. 503074*

**HEVUR NAKAR**
eitt trummusett, ella partar av einum, sum ikki verður brúkt longur, vil eg fegin frætta nærri.
*Tlf. 314567*

**TRUMMUSPÆLARI**
Trummuspælari søkist til bólk í Eysturoynni, skjótast gjørligt.
*Ring og hoyr nærri á tlf: 261948 & 441548*

**TRUMMUSETT**
Pearl Target, sum nýtt, til sølu. Ring til Flóvin
*tlf. 253167 ella 371844*

**BLÁUR EL-GUITARI**
Fender telecaster thinline til sølu. Prísuppskot kr. 6.000,- húsi fylgir við.
*Tlf. 322241 ella 271935*

## Út- & Sjónvarp

**ANLEGG TIL SØLU**
Panasonic anleg til sølu fyri 2000 kr.
*Tlf. 373854/255533*

**SJÓNVARP TIL SØLU**
33" Thomson sjónvarp v/borði til sølu fyri 9.000 kr.
*Ring 361178 eftir kl. 18*

**STEREOANLEGG**
Eitt Philips stereoanlegg til sølu fyri 3.500,- Nýprísur 6.500,- 6 mðr. gamalt.
*Tlf. 584171, eftir kl. 12 257401*

**RADIO YNSKIST**
Hevur onkur eitt radio at selja mær frá uml. 1975 vil eg gjarna keypa tað. Helst Tandberg ella Philips.
*Tlf. 319613*

**SONY SJÓNVØRPA**
VPL-ES2, óbrúkt, prísur 8.500,-
*Ring 316657*

## Ymiskt

**ER TÚ ÍMILLUM 50-70 ÁR Í TÓRSHAVN**
Og hevur áhuga at hugna tær í góðum anda vi stokkum + te, kaffimunn uml. tvær ferð um mán. Tú kanskt ringja á
*Tlf. 582990*

**TRAPPA YNSKIST**
Innandurða trappa ynskist. H. 240 cm.
*Tlf. 457178 ella 222640*

**AMATØR-RADIO ÚTGERÐ**
Sommerkamp SSB Transceiver FT 250, BW Antenna Tuner Model VS 300 A, DAIWA Eleconic Keyer, hátalari, SWR-meter model TTS, tvey skeiðhefti + morsubond til sølu fyri 4.000 kr.
*Tlf. 441893*

**HJÁLHESTAHJÁLMAR**
Tveir súkkluhjálmar (Atlas og Winther) til sølu fyri 100 kr. fyri hvønn
*Tlf. 441893*

**FLAMINGUPLÁTUR**
ÁTTA FLAMINGIOPLÁTUR (3000X1000X50) MM3. Vælegnaðar til flótandi gólv, til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 441893*

**KASSATÓL**
Casio, lítið nýtt, prísuppskot: 5.000 kr.
*Tlf. 333014 ella 226161*

**DVD TIL SØLU**
Panasonic dvd afspælari av besta kvaliteti nýprísur uml. 3800 kr nú 1500 kr við dvd filmun.
*Tlf. 220405*

**TIL SØLU**
Nógvir góðir vhs filmar orginalir.
*Tlf. 220405*

**VIT FARA AT HAVA**
eina stuðulskonsert til frama fyri skóta landsleguí Danmark við vælumtókta Magna Christiansen og kirkjukórinum í Vestmanna í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið 29. januar kl. 20.00. Eisini fara vit at selja lutaseðlar. Møti fjølment. Øll eru hjartaliga vælkomin. Børn atgongd saman við vaksnum.
*KFUM-Skótarnir í Kvívík*

**NÚ FER AT NÆRKAST**
Vit fara at hava páskareggja tombola við 600 páskareggum í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 27. februar kl. 16.00. Øll eru vælkomin.
*KFUM-Skótarnir í Kvívík*

**TIL SØLU**
Komplett sett manual, spæliregluг v.m. frá Donsku Tipstænastuni til sølu fyri 100 kr.
*Tlf. +45 86448627/ +45 26747474*

**NAVNAKAPPINGIN**
Nú styttist til 1. februar tá uppskotið um navnið á tí nýggja 5 mannafarinums kal vera inni. Vinningurine r 1.000 kr. Royn og finn eitt gott uppskot og send tað inn.
*Strálan, 490 Strendur*

**EIGUR NAKAR**
3 atgongumerkir til Fólk og Dólgar at selja mær, so vinarliga ring
*tlf. 222308*

**HUGNAKVØLD Í »SKÁLANUM«**
í Klaksvík. Leygarkvøldið 5. februar kl. 20 skipar stuðulsfelagið Dragin fyri árliga hugnakvøldinum við borðhaldi, sangi og dansi í Skálanum. Frá kl. 23 verður dansur, har bólkurin »Flúrar« úr Havn spælir. Tilmelding til borðhaldið í seinasta lagi hósdagin 3. februar á tlf. 456661 og 456282.
*Stuðulsfelagið Dragin*

**PLAST VINDEYGA**
til sølu, 198 x 145 bíliga til sølu.
*Tlf. 441309/441412*

**VHS FILMSAMLING TIL SØLU**
fyri 700,- kr.
*E-mail: tof82@yahoo.com*

**TIL SØLU**
Video kamera av merkinum Sony, video8, ongantíð brúkt, sum spildurnýtt, við tasku. Einans 1.500,-
*Tlf. 252829*

**NÝTT DIGITAL KAMERA**
Finepix F402 við 16MB korti og software til sølu fyri kr. 1900,- Nýprísur, sí pricerunner.dk
*Tlf. 322241 ella 271935*

**GRÍMA!**
Ein grøn gríma við stjørnumynstri stødd »Full« til sølu fyri 100 kr.
*Tlf. 224297*

**YNSKIST**
7 stk massivar fyllingsinnhurðar ynskjast. Hurðastødd: 725 x 2040mm, v/ karmi stødd 786 x 2089mm. málað/lútað ongan týdning - eftirsum tær skulu málast.
*Tlf. 584342*

**TIL SØLU**
Eitt stórt solarium til útleigan við 32 stórum rørum og 9 smáum til sølu.
*Tlf. 452089*

**VINDEYGU TIL SØLU**
1 stk. h. 130 x b. 110.
3 stk. h. 120 x b. 130.
1 stk. h. 130 x b. 130.
og eitt Velux takvindeyga 70 x 55 bíliga til sølu.
*Tlf. 503249*

**HEY HEY!**
Nú fer at nærkast: Vit fara at hava páskareggja tombola við 600 páskareggum í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 29. februar kl. 16.00. Øll eru vælkomin.
*KFUM-skótarnir í Kvívík*

**ÁRSVEITSLAN**
hjá Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdarfelagnum Varðanum. Ársveitslan verður í bygdarhúsinum leygarkvøldið 12. februar kl. 19.30. Allir hósvíkingar úti og heima eru vælkomnir. Veitslan kostar 180 kr. Seinasta freist at keypa sær atgongumerki er mánakvøldið 7. februar kl. 22.00 í handlinum hjá Jóannesi. Borðreitt verður við feskari súpan, lambskjøti og oman ís við frukt. Góður dansur og skemt.
*Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdarfelagið Varðin*

**SUNDA PENSIONISTAFELAG 20 ÁR**
Í sambandi við at Sunda Pensionistafelag hevur 20 ára stovningardag, verður hugnaløta 3. februar 2005 kl. 18.30 í Eydnuni á Oyrabakka fyri limun og innbodnum. Sigast skal frá luttøku í seinasta lagi 28. januar á telefon 423357 og 422055.
*Nevndin*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!